gult cyan magenta svart



Leif Abrahamsen, stjóri á Gjaldstovuni
Mynd: Jens Kristian Vang

Landskassa-roknskapurin á internetinum

Føroya Gjaldstova er komin so langt á tøkniligu leiðini, at í heyst verður mánaðarligi landskassa-roknskapurin lagdur út á internetið

Sveinur Tróndarson

Tað eru ikki so nógv ár síðani, at landskassaroknskapurin bara var at fáa fatur á í pappírsútgávu. Soleiðis er ikki longur, tí eins og allar aðrar framkomnar fyritøkur hevur landskassin eisini tikið við nýggju tøknini á internetinum.

Seinastu árini hevur Føroya Gjaldstova miðvíst arbeitt við at brúka internetið, sum ein part av sínum kunningarvirksemið til brúkararnar og síðani 1997 hevur landskassaroknskapurin verið tøkur á internetinum.

Henda tænasta til brúkararnar gevur øllum møguleika at fara innar at hyggja at tølunum, og tað er ein partur av politikkinum, at umsitingin skal verða opin um tað, sum fer fram innanveggja.

Umframt at veita borgarunum eina tænastu, hevur Gjaldstovan eisini givið øllum aðalstýrunum atgongd til roknskaparskipanina, og tað merkir, at stovnsleiðararnir alla tíðina kunnu fylgja við í, hvussu støðan er á teirra øki. Við hesum hava allir stovnsleiðarar fingið eitt gott stýringsamboð, og í dag ber ikki til, bara at siga, at teir ikki vóru greiðir yvir at støðan var so og so …

Dagførda arbeiðið við roknskapinum hevur eisini við sær, at arbeiðið tá fíggjarlógin skal gerast verður einfaldari. Fyrr hevur umsitingin brúkt tøl frá tveimum og kanska trimum árum undan sum grundarlag, men nú brúkar hon tølini frá í fjør. Hetta ger fíggjarlógararbeiðið meira álítandi, og tað má vera endamálið við tí heila.

Næsta stigið á tøkniligu leið Gjaldstovunar verður at leggja mánaðarroknskapirnar út á internetið. Arbeitt verður við hesi ætlan, og sum skilst, er ætlanin, at mánaðarroknskapirnir vera tøkir á internetinum einaferð í heyst. Sum vera man, verður tað eitt sindur forskotið, tí øll tøl og skjøl skulu fáast inn í skipanina, men stjórin á Gjaldstovuni Leif Abrahamsen metir, mánaðarroknskapirnir verða lagdir út umleið ein mánað forskotnir.

Orsøkin til, at arbeiðið við at gera roknskapirnar algongdar er, at neyðug orka er sett av til tað á Gjaldstovuni, segði stjórin.

ILA-gátan skjótt loyst

Vaksinuframleiðarin, Bayotek International, roknar við, at tey í summar hava funnið fram til neyðugu upplýsningarnar, sum skulu til fyri at finna eina vaksinu móti ILA-sjúkuni.

Sambært internettænastuni IntraFish er Bayotek International við at koma á mál vid seinastu royndunum.

jhg

Vilhelm Johannesen 25 ára starvsdag á Postverkinum:

Skrivar nú postsøguna

Jan Müller

Herfyri ella rættari 23. juni kundi Vilhelm Johannesen úr Klaksvík halda 25 ára starvsdag hjá Postverkinum. Dagurin varð hátíðarhildin á høvuðsdeildini hjá Postverki Føroya í Havn við køkum, blómum og góðynskjum.

Stjórin á Postverk Føroya, Bergur í Garði, handaði Vilhelm Johannesen eitt heiðursbræv sum viðurkenning fyri at hava starvast á Postverkinum í 25 ár, hann fekk eisini eitt stórt blómutyssi frá stjóranum, sum takkaði honum fyri góða og trúgva tænasta á Postverkinum øll hesi árini. Eisini fekk Vilhelm Johannesen sum vanligur siður er á Posthúsinum, tá starvsdagar verða hildnir, ein kekk uppá 1000 kr. umframt ein frídag við løn. Hetta stendur í sjálvum sáttmálanum.

Eisini umboð fyri Postfelagið handaði Vilhelm eitt blómutyssi og takkaði honum fyri tann stuðul, sum Vilhelm altíð hevði víst vanliga postmanninum bæði í sínum starvi á tingi og á Postverkinum.

Hóast talan var um 25 ára starvsdag, so byrjaði Vilhelm annars á Posthúsinum í Klaksvík 1. juni 1962 tvs. fyri umleið 38 árum síðani. Tá í tíðini koyrdi Posthúsið á ein annan hátt, enn tað ger í dag. Tá hevði postavgreiðslumaðurin í Klaksvík, tað rak Axel Petersen, Posthúsið uppá sáttmála. Starvfólkini vórðu tí formliga sett í starv hjá honum tey fyrstu fimm árini. Í 1967 var Vilhelm settur sum aspirantur til tænastumannastarv í danska postverkinum. Tvey ár seinni varð hann tænastumaður.

Postverksstjórin Bergur í Garði handar Vilhelm Johannesen, blómur á 25 ára starvsdegnum herfyri

Tá so postverkið varð yvirtikið fingu postmenninir eina serliga skipan. Landsstýrið vildi ikki yvirtaka teir sum tænastumenn. Teir vóru tá 77 í tali. Talið á tænastumonnum undir landinum var umleið 44 og vóru teir í landsstýrinum bangnir fyri, at vórðu postmenninir yvirtiknir sum tænastumenn, so fóru at koma krøv frá nógvum almennum stovnum um at gera teirra fólk til tænastumenn.

Ein semja varð tí gjørd, sum segði, at tá talan var um uppsókn og eftirløn, tá høvdu teir tænastumannarættindi.

Vilhelm hevði farlovyi í átta ár tilsamans. Tvs. at tey fyrstu fimm árini á Posthúsinum í Klaksvík og átta árini í farloyvi ella íalt 13 ár, telja sostatt ikki við, nú 25 ára starvsdagur verður hildin. Fyrsta farloyvistíðin var frá 1. september í 73 til mars í 75, tá hann var blaðstjóri á Sosialinum. Tvær ferðir hevur hann havt farloyvi, meðan hann sat í landsstýrinum. Seinasta farloyvistíðin var í 94. Tá var so nógv at gera í tí politiska arbeiðinum, at Vilhelm bað um farloyvi.

Tá Vilhelm byrjaði sum postboð í Klaksvík fyri 38 árum síðani hevði hann allar møguligar uppgávur um hendi. Arbeiðið hevur verið sera fjølbroytt og hevur hann tikist við mest sum alt hugsandi posthúsarbeiði.

Tá Vilhelm kom úr aftur landsstýrinum í 89 segði táverandi postverksstjórin við Vilhelm, at tað var torført at fáa hann inn aftur í skipanina í Klaksvík. Hann beyð honum tá eitt starv í Havn sum útbúgvingarleiðari. Har byrjaði hann so 1. september 1989.

Ein av uppgávunum sum Vilhelm fekk aftrat var at gera eitt blað, sum er innanhýsis kunning í Postverkinum. Fyri fimm árum síðani fór Vilhelm so eisini undir at savna tilfar til eina bók um Postverkið. Ætlanin er, at hon skal koma út 1. apríl 2001, tað er 25 ára dagurin fyri, at Postverkið varð yvirtikið.

Vilhelm sigur, at hann hevði verið fegin at frætt frá fólki, sum hava nakað tilfar liggjandi ella minnast okkurt, sum kann hava postsøguligt virði. Her hugsar hann eisini um myndir.

Í dag starvast Vilhelm bert hálva tíð á Postverkinum. Hann er tingmaður, valdur fyri Javnaðarflokkin í Norðoyggjum og røkir eisini týðandi álitisstarvið sum limur í Fíggjarnevndini. Vit ynskja Vilhelmi tillukku við starvsdegnum og góða eydnu við bókini um føroyska postverkið gjøgnum tíðina.

Eisini umboð fyri Postfelagið handaði starvsfelaganum blómur á 25 ára starvsdegnum

MB-Tours á Bryggjubakka

MB-Tours nevnist n‡ggj fer›avinnuskrivstova, sum heldur til í hugnaligum hølum á Bryggjubakka í Havn. Umframt at selja fer›ase›lar, hevur MB-Tours eisini sambond í útlondum, sum fáast vi› summarhús, ginstingarhús, trygging og anna›. Eisini ver›ur skipa› fyri ymsum heima í Føroyum

Myndir: Jens Kristian Vang

Menninir aftanfyri n‡ggju fer›avinnuskrivstovuna MB-Tours bjó›a nú vi›skiftafólkum vælkomnum. MB-Tours heldur til í hølunum á Bryggjubakka 2

Dagfinn Olsen

Hóast talan er um n‡ggja fyritøku, so eru ta› somu persónar, sum hava upparbeitt fyritøkuna Mouritsens Bussar, i› standa aftanfyri, og ta› er yngra ættarli›, i› tekur vi› lei›sluni. Og búmerki› er eisini ta› sama.

Gó› kundatænasta

Ta› er Magni V. Mouritsen, i› stendur fyri n‡ggju fer›avinnuskrivstovuni á Bryggjubakka.

Hann er júst útlærdur innan fer›avinnu í Danmark.

- Ta› var ikki ætlanin at byrja júst nú, men eg tók av, tá eg fekk møguleika at leiga hesi hølini. Eisini er fer›afólkatali› vaksandi, eins og virksemi› í samfelagnum, sigur Magni V. Mouritsen.

Hann hevur gó›ar vónir. Navni› hjá fyritøkuni er innarbeitt og gott og Magni ætlar at arbei›a fyri, at kundatænastan framvegis er gó›.

Fyrstur at støkka inn á gólvi› hjá MB-Tours fyri at ynskja tillukku vi› hølunum og virkseminum á Bryggjubakka, var danski filmstjórin Nils Malmros

Gó› sambond

MB-Tours hevur gó› sambond til Danmarkar. Samband er vi› flogfeløg. Umframt at selja fer›ase›lar, ber eisini til at fáa nærri at vita frá MB-Tours um summarhús, gistingarhús, tryggingar og anna› heima og í útlondum.

Men eisini heimligi markna›urin hevur áhuga.

Eins og onnur her heima, i› fáast vi› fer›avinnu, so fer MB-Tours eisini at skipa fyri útfer›um og ø›rum.

Liggur væl fyri

Fyritøkan liggur væl fyri í Havn.

- Hóast hølini sum so ikki liggja mitt í b‡num, so liggja tey væl fyri og eru hugnalig og gó›, sigur Magni V. Mouritsen, sum beinanvegin tók av, tá hølini vóru tøk og hann kundi fáa tey.

Seinastu vikurnar hava fólkini aftanfyri MB-Tours arbeitt vi› at rigga hølini til, so ein snøgg fer›avinnuskrivstova er komin bururúr.

Almenn móttøka var mánadagin 3. juli og ta› er ein fúsur og vónaríkur fer›avinnuma›ur, sum nú er farin til verka á Bryggjubakka 2. Í sjálvari brekkuni ni›an á bakkan og ni›an til Havnar Kirkju.

Vatni› ljó›ar sum um onkur hevur drukki› av tí

Forlagi› After Hand hevur givi› út n‡ggja yrkingasavni› hjá Tóroddi Poulsen. Savni› er tvímælt og høvundurin hevur sjálvur t‡tt yrkingarnar úr føroyskum til danskt

Dagfinn Olsen

At fáa eitt yrkingasavn frá Tóroddi Poulsen í hondina er ongantí› ke›iligt.

Hesafer› er ta› eitt danskt forlag, i› gevur út og bókin í sjálvum sær er heldur ø›rvísi í sni›i, enn vit eru von vi›, uttan at ta› júst er gjørligt at siga hvat ta› er, i› er orsøk til tess. Kanksa er hon bara minni, lættari og ø›rvísi í skapi.

Men innihaldsliga er ta› Tóroddur.

Ein skjót bla›ing ígjøgnum bókina vísir hetta. Nú er ikki víst, at yrkjarin er gla›ur fyri at ver›a sagdur at vera hin sami, tí listafólk vilja ofta fegin flyta seg.

Men Tóroddi líkt, so fangar hann lesaran beinanvegin vi› at sta›festa, at „í fyrstuni var moldin, sí›ani kom pástandurin“.

Og yrkingarnar eru hugvekjandi. Heimsspeki og gerandiskostur í eini hægri eind.

Her skal ikki greinast og tulkast, men bókin er full av gullkornum og pástandum.

Yrkjarin sta›festir, at „eingin oyggj er lítil, sta›festi tú, tá tú lærdi at ganga“.

Eisini hóma vit ein yrkjara í úlegd, ein útiseta.

Tóroddur sigur: „hati hesar hæddir, ikki tí tær øra meg, men tí eg øri tær“.

Hvørt hetta eru or› útisetans, kann ivi kanska vera um, men meira beinlei›is eru or›ini „minist, at í føroyum renna vit undan spøkilsum, tí tey trúgva á okkum, tá vit ræ›ast tankan, at vit eru tann pínufulli parturin, av teimum dey›u“.

Sum heild er yrkjarin í huganum heima í Føroyum.

Eitt spennandi yrkingasavn frá Tóroddi. Hann hevur sjálvur t‡tt yrkingarnar til danskt, solei›is at føroyska yrkingin stendur á vinstru bla›sí›u og danska t‡›ingin á høgru sí›u.

Og yrkjarin sta›festir: „skaldskapur er ikki skaldskapur, konur eru ikki menn“.

Og eina a›rasta›ni: „okkara brim ljó›ar betur enn tykkara“.